

## Gongur betur hjá Henrik Larsen

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin Henrik Larsen hevur fingið gongd á liðið hjá sær. Køge spældi í gjár á útivølli ímóti Fremad Amager, har Andrew av Fløtum framvegis ikki er klárur at spæla, og Køge vann dystin heili 4-1. Í hálvleikinum var støðan 1-1, men tá ið ein tími varð farin, skoraði Køge tvey tøtt mál, og so settu teir punktum við einum máli seint í dystinum. Fremad Amager liggur miðskeiðis á stigatalvuni, men Køge nú er komið upp á fimta pláss.

## Inter skoraði fýra men fekk trupulleikar

Inter legði seg fram um 4-0 í dystinum ímóti Chievo í gjárkvøldið, men móti endanum av dystinum vaknaði Chievo og skoraði trý mál seinasta korterið. Crespo legði Inter á odda, Walter Samuel og Dejan Stankovic økti, áðrenn Crespo aftur var fram við. Inter var rættiliga á sigurskós, men so kom Chievo fyri seg, og tað var líka við, at teir kláraðu at javna. Inter vann tó dystin 4-3 og liggur á odda í Seriu A.

# AB kvinnurnar vunnu á meistarunum



**KÍ hevði longu vissað sær steypið, men tað var ein skeina í gullið, at tær á Argjum taptu seinasta dystin á kappingarárinum**

FÓTBÓLTUR

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Kvinnurnar hjá AB vunnu leygardagin 3-2 móti KÍ. Hetta var seinasti dystur í ár hjá kvinnunum, og tí fekk KÍ eftir dystin handað steypið, sum tær longu høvdu tryggjað sær áðrenn dystin.

KÍ legði seg á odda við málið, sum Malena Josephsen skoraði. Men seks minuttir seinni javnaði AB. Tað var Elin Katrina Haraldsen, sum leikti ein sera góðan dyst, ið setti bóltin í netið

Síðani var tað AB, sum aftur skoraði. Tað leikaði hart á frammanyri KÍ málið, og til endans var tað ein KÍ verjuleikari, sum hevði seinasta fótin á og beindi hann í egið mál.

Í seinna hálvleiki sat AB á tí mesta. Tað vóru tó KÍ, sum javnaðu. Viviann Bjartalíð tók ein langan túr í vinstru síðu og smekkaði bóltin í netið tætt undir málinum.

Men AB svaraði aftur, og eftir eina misskiljing millum mámlmannin og verjuleikara hjá KÍ, sær Mona Breckmann sær møguleikan at leggja seg ímillum og seta bóltin í tómt mál.

Tá ið dómararin bríkslaði fyri seinastu ferð, vóru tað tó AB kvinnurnar, sum vóru glaðast. Tær eru tær fyrstu, sum hava vunnið á KÍ kvinnunum í landskappingini síðani 2002. KÍ kvinnurnar vóru tó glaðar um steypið, og til endans gleddust bæði liðini saman.

AB fekk bronsu, meðan GÍ fekk silvur.

## Hetta køvdi gleðina

Hóast KÍ hevur vunnið meistaraheitið í fótbólti hjá kvinnunum fyri sættu ferð, var málverjin hjá KÍ, Randi Wardum, als ikki fegin eftir dystin. Lagið gjørdist tó betri eftir nakrar minuttir, men tapti dysturin køvdi tó meistaragleðina eitt sindur.

- Hetta køvir gleðina - í hvørt fall hjá mær. Eg haldi ikki, at eg havi latið 3 mál inn sum KÍ leikari í einari føroyskari kapping fyrr, sigur Randi Wardum.

Hon dugir ikki at siga, hví tær ikki megnaðu at vinna dystin í dag, tá ið tær annars hava verið mestsum ógjørligar at vinna á.

- Vit vistu, at AB fór at geva okkum góða mótstøðu, og at tær fóru at kempa, men eg trúgvi, at vit hava tikið tað ov avslappað, tí at meistaraheitið var longu komið í hús áðrenn, sigur hon.

Randi heldur annars, at hini liðini hava ment seg.

- AB og GI kunnu saktans geva okkum stóra mótstøðu næsta ár. Tær hava góðar ungar leikarar, sum stríðast væl, sigur føroyameistarin.

**-heinik**

## Sigurin hevur nógv at siga

Kristina Simonsen leikar við AB. Hon er sera væl nøgd við 3-2 sigurin á KÍ. AB kvinnurnar vóru sera fegnar, og tað er eisini ein sannroynd, at tað er eitt satt bragd, ið tær hava framt.

- Vit eru væl nøgdar við sigurin. Hann hevur sera nógv at siga fyri okkum, tí at nú hava vit vunnið á meistarunum og sostatt prógvað, at vit kunnu spæla upp til tær. Tað var eisini gott at vinna á teimum á síðsta leikdegi, tá ið tær fingu steypið handað, sigur Kristina.

Tær í AB ætla sær at gera seg galdandi í toppinum næsta ár.

- Vit ætla okkum at hótta KÍ næsta ár. Um vit møta væl upp til venjing og eru seriøsar, so kunnu vit koma langt. Umstøðurnar eru í øllum førum góðari felagnum, so fortreytirnar eru har, sigur Kristina.

**-heinik**

# Fyrsta Grand Prix kapping í talv í ár liðug

Grand Prix kappingin 2006 fór av bakkastokki um vikuskiftið, tá fyrsta kappingin varð telvað í Ósáskúlanum í Klaksvík. 21 telvarar luttóku. Umframt fleiri sterkar telvarar, sum á pappírinum vóru favorittar, luttóku rættiliga nógvir ungir telvarar eisini. Undirtøkan var hampuliga góð, men ivaleyst varð vónað, at enn fleiri møttu.

Telvað vórðu 7 umfør, har hvør telvari hevði 15 minuttir í part til talvið.

Undan seinasta umfarinum var Carl Eli Nolsøe Samuelsen best fyri, at vinna kappingina, eftir at hann hevði vunnið á Martini Poulsen og telvað javnt ímóti Rana Nolsøe, sum hevði telvað javnt ímóti Martini Poulsen. Rógvi Dragaberg gjørdi harða mótstøðu og í tíðarneyðini mátti Carl Eli ásanna, at ikki var møguligt at fáa meir enn javnt. Tá javnleikurin varð tikin, var heldur hinvegin góður møguleiki hjá Rógva at vinna. Tískil endaðu bæði Carl Eli og Rani á 6 stigum og deildum 1. plássi. Trygg telving frá teimum báðum - onki tap í 7 umførum.

Telvað varð somuleiðis um 2 ratingvirðislønir. Margar Berg vann 1. ratingvirðislønina í kappingini fyri telvarar við styrkistalinum lægri enn 1600. Sára Olsen vann 2. ratingvirðislønina fyri telvarar við styrkistalinum lægri enn 1200, í harðari kapping við heili 4 aðrar telvarar.



*Vinnarar: Martin Poulsen (3), Rani Nolsøe (1-2), Sára Olsen (2. ratingvl.), Carl Eli N. Samuelsen (1-2), Margar Berg (1. ratingvl.)*